

## Dýrari at lata rusk á KOB

Eitt av málunum, sum varð samtykt á býráðsfundinum seinasta hóskvøld, var ein hækkan av ruskgjaldinum í kommununi. Tað verður hereftir dýrari at lata rusk inn á Kommunalu Orku- og Brennistøðina á Sandvíkarhjalla. Forkvinnan í Heilsu- og Umhvørvisnevndini, Elin Lindenskov, var ein av tveimum býráðslimum, sum tók orðið í hesum málinum. Hon segði, at hóast tað beyð henni ímóti at hækka avgjøld, so mælti hon til at taka undir við fíggjarnevndini. Samtyktin fór at merkja eina meirinntøku til KOB upp á 1,5 milliónir krónur árliga. Sjúrður Olsen úr Fólkaflokkinum mælti frá at leggja fleiri avgjøld á vinnuna. Hann segði seg rokna við, at eitt hækkað gjald fór at merkja, at fólk ikki lótu ruskið inn á KOB, men í ringasta føri tveittu tað í havið ella í náttúruna. Uppskotið varð kortini samtykt av samgonguni, meðan andstøðan atkvøddi ímóti.

## ES herðir ímóti royking

ES-kommiserurin í heilsumálum, Androulla Vassiliou úr Grikkalandi, vil hava ES-londini at herða reglurnar um royking á almennum støðum og á arbeiðsplássum. Ætlanin er, at broytingin skal galda í øllum teimum 27 limalondunum, og at tær skulu koma í gildi í 2012. Fleiri av ES-londunum hava longu avmarkað møguleikarnar hjá sínum roykjarum, og heilsukommiserurin heldur, at somu strongu reglur skulu galda í øllum samveldinum. Androulla Vassiliou sigur, at í 2002 doyðu 19.000 ES-borgarar av lungnakrabba, sjálvt um teir ikki royktu. Trupulleikin var, at teirra arbeiðsfelagar roykti á arbeiðsplássinum, og at teirra húsfólk roykti heima við hús, sigur hon.

# Asfaltvirkið játtað byggiloyvi

**Á býráðsfundinum í síðstu viku samtykti Tórshavnar býráð at játta einari umsókn frá P/f Asfaltvirkinum um at byggja eina høll at goyma skervi í**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var longu í november 2005, at Asfaltvirkið á Sundi søkti býráðið um at víðka leigumálið av økinum, tí goymskuplássið til skerv var ov lítið.

Tað hendir kortini lítið og einki í málinum fyrr enn Asfaltvirkið í skrivi 2. januar 2008 søkir av nýggjum, hesaferð um byggiloyvi til eina høll at goyma skerv í. Við at liggja úti er skervurin ofta vátur og má tí turkast áðrenn nýtslu, og hevur hetta bæði seinkingar og eyka útreiðslur við sær.

23. januar í fjør samtykkir fíggjarnevndin at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og havnanevndina til ummælis.

Tá talan er um at goyma skervin inni í staðin fyri úti, skuldi tað ikki tikið meiri pláss enn tað sama, og tilmælið frá havnameistaranum er tí, at mælt verður til at ganga umsóknini á møti, at byggja á ídnaðarøkinum oman fyri vegin.

Havnanevndin samtykti á fundi 18. februar at taka undir við tilmælinum.

Økið, sum søkt verður um, er umleið 4.900 fermetrar til støddar.

Býararkitekturin mælir tó frá at ganga umsóknini á møti og mælir í staðin til, at økið verður bjóðað út eftir bíðilistanum. Hesum taka Bogi Andreasen og Halla Samuelsen undir við á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 18. juni í ár. Levi Mørk og Jan Christiansen mæla tó til at ganga umsókninni á møti.

### Loyva kortini

Undan býráðsfundinum hóskvøldið var fundur í fíggjarnevndini, og har tók ein meiriluti undir við at víðka leigusáttmálan. Talan var um Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Sjúrð Olsen.



*Loyvt verður nú P/f Asfaltvirkinum at byggja ein goymslubygning her inni á Sundi, har teir hava asfaltverk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ein minniluti, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal, mælti til at taka undir við býararkitektinum.

Á sjálvum býráðsfundinum førdi Marin Katrina Frýdal fram, at økið átti at verið boðið út sambært bíðilistanum, men hesum vísti Sjúrður Olsen aftur og segði, at bíðilistin var eftir keypi av grundstykkjum og ikki leigusáttmálum. Hann vísti annars á, at P/f Asfaltvirkið jú hevði bíðað í hálvtfjórða ár eftir svari.

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið frá fíggjarnevdini, og varð hetta samtykt við níggju atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Inga Dahl og Sjúrður Olsen.

Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov greiddu ikki atkvøðu.

Sostatt er endaliga samtykt, at P/f Asfaltvirkið kann byggja ein goymslubygning til skerv inni á Sundi.

# Ósemja um Hans í Funningsstovu

**Tað hevur fingið nakað av umrøðu, at Tórshavnar kommuna stendur fyri umvælingini av einari ogn í Niels Finsensgøtu, sum Føroya Banki eigur. Soleiðis var eisini á býráðsfundinum seinasta hóskvøld**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur nakað av kjakið verið um ognina Niels Finsensgøta 13, bygningurin millum Føroya Banka og Kondittaríið. Ella húsini hjá Hans í Funningsstovu.

Tað stutta av tí langa er,



*Tað var umráðandi, at handverkararnir kundu gera arbeiðið beinanvegin, so húsini kunnu standa liðug til ólavsøku*
*Mynd: Jesn Kristian Vang*

at Føroya Banki eigur bygningin, men tað er eingin loyna, at hann er ikki snøggasti bygningurin í býnum. Tí tóku borgarstjórin og varaborgarstjórin stig til at fáa húsini umvæld. Hetta varð gjørt í einu semju við Føroya Banka sum gekk út upp á, at Tórshavnar kommuna stendur fyri umvælingini, men Føroya Banki rindar.

Tað vil tó siga upp til eina ávísa upphædd. Innheintað tilboð setti upphæddina til 498.948,00 krónur, og hesa upphædd hevur Føroya Banki givið váttan fyri at rinda. Tað vil so aftur siga, at fer kostnaðurin upp um hesa upphædd, skal Tórshavnar kommuna rinda meirkostnaðin.

Fyri at umvælingin skal kunna setast í verk varð gjørdur ein leigusáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Føroya Banka, galdandi í fimm ár, og sum svarar til umvælingar upphæddina. Hetta gevur 8.315 krónur um mánaðin.

### Ónøgd

Andstøðan var tó ónøgd við framferðarháttin í málinum. Fyri tað fyrsta vísti Anfinn Brekkstein á, at tað var ikki rætt at fara til ávísar handverkarar at innheinta tilboð fyri triðja part. Heldur ikki var tað rætt at lata ávísari fyritøku undirhonds leigusáttmála, tí hetta er kappingaravlagandi.

Eisini Sjúrður Olsen fíltist á framferðarháttin í málinum, men Bogi Andreasen, varaborgarstjóri, vísti atfinningunum aftur. Hann segði, at umrødda handverkarafyritøka kundi gera arbeiðið her og nú, og tað var rættiliga avgerandi, skuldi bygningurin standa liðugt umvældur til ólavsøku.

Hann helt somuleiðis heldur ikki, at nakar fekk framíhjárætt til leigusáttmála, tí Guðrun & Guðrun vóru tær einastu, sum høvdu spurt um størri hølir.

Varaborgarstjórin helt annars, at málið var »negativt ladað« av andstøðuni, men hesum vísti andstøðan aftur.

Málið var fyri í býráðnum eftir kravi frá minnilutanum í fíggjarnevndini, Sjúrða Olsen. Tað varð sostatt viðgjørt á býráðsfundi, men kom ikki til atkvøðugreiðslu, tá tað framman undan longu var avgreitt.